# Kára Dalsgaard Petersen til minnis



Hósdagin 1. august 2002 andaðist Kári, ikki ár aftaná at han misti Maritu konu sína. Saknurin og tómrúmið eftir Maritu vóru nívandi fyri Kára, sum var so tætt knýttur Maritu. Men alt ov tíðliga fór eisini hann, bert 66 ára gamal.

Kári varð føddur 11. januar 1936 á Velbastað, sum elstur av trimum systkjum, sonur Napoleon Nolsøe Petersen úr Sørvági og Annu Sofíu Dalsgaard av Velbastað. Fyrstu árini búði hann í Sørvági. Av tí at pápin starvaðist sum lærari, búðu tey eitt skifti á Slættanesi og á Velbastað. Kári fór til Havnar at ganga í skúla og tók præliminærprógv í 1952 og studentsprógv í 1954.

Hann tók løgfrøðiligt embætisprógv á Københavns Universitet á sumri 1964. Eitt árið starvaðist hann tó sum læraravikarur í Fámjin. Í 1964 byrjaði Kári sum advokatfulltrúi í Esbjerg, og árið eftir tók hann við starvi sum advokatfulltrúi í Keypmannahavn. Advokatviðurkenning frá løgmálaráðnum fekk hann í 1967.

Í 1968 flutti Kári við húski aftur til Føroya og tók við starvi sum løgfrøðiligur fulltrúi í landsstýrinum, og hevði har um hendi málsøkini kommunumál, ídnaðarviðurskifti og havrættarmál og fekk tá høvi landsstýrisins vegna m.a. at luttaka á minniríkum havrættarstevnum í Venezuela og New York. Kári varð í 1969 settur sum nevndarlimur og skrivari hjá nevndini, sum í 1972 legði úr hondum dygdargott álit um kommunuviðurskiftini og gjørdi uppskot til nýggja kommunuvallóg og kommunulóg.

Hetta álitið gjørdist grundarlag undir nýggju kommunuvallógini og kommunulógini í 1972. Eisini var Kári eitt skifti formaður í landsskattanevndini.

Tann 1.oktober 1976 stovnsetti Kári egið advokatvirki í Havn, fyrst í Bókbindaragøtu og flutti seinni í N. Winthersgøtu. Hann byrjaði í smáum, men eitt skifti hevði hann tveir advokatar og trý skrivstovufólk í starvi afturat sær, og var hann ein so sera lagaligur og fittur arbeiðsgevari, sum altíð vildi starvsfólki sínum tað besta.

Kári var ein góður advokatur. Góð analytisk evni, vælformuleraður, gott minni og eina breiða vitan. Hann gjørdist lættliga eldhugaður og dugdi væl at føra sjónarmið síni fram. Og honum dámdi eisini væl at sleppa at føra tey fram – ivaleyst eisini tí at hetta lá so sera væl fyri hjá honum. Hesin eginleiki gjørdi uttan iva sítt til, at honum dámdi so væl at møta í rættinum og verja áhugmál. Serliga væl dámdi honum at vera verji í revsimálum. Ikki bert at hava henda leiklutin at vera tann, sum ansar eftir, at samfelagið ikki fremur órætt móti einum ákærdum, men eisini at vera sálarhirði. Var ein klientur hansara varðhaldsfongslaður, vitjaði hann trúliga í varðhaldinum, og fleiri eru tey, sum støðugt vendu aftur til hansara at biðja hann verja seg. Tey høvdu álit á honum, og komu ivaleyst tætt inn á tann Kára, sum ikki altíð var so lættur at koma inná, men kortini í løtum var so nær.

Kári var rættiliga privatur til dagligt. Men tær løturnar vóru eisini, tá hann opnaði seg og veruliga vísti, hvussu kensluborið menniskja hann var. Og í góðum vertskapi komu fram nógvar av teimum síðum hansara, sum hann til dagligt meira og minni fjaldi, og hann var tá so charmerandi sum fáur. Fyri ikki at tosa um, tá hann tók fiólina fram.

Kári var ein sera evnaríkur maður. Hann hevði nógvar gávur. Ikki bert var hann skjótt- og vælhugsandi og las bøkur við somu skjótu ferð. Hann hevði sum nevnt eitt gott minni, sum kom honum til gagns í arbeiðslívinum, og tá hann leitaði aftur í bókmentir og farnar hendingar og upplivingar, og væl dámdi honum at siga frá.

Listarligar gávur hevði Kári góðar og brúkti tær bæði til gamans og álvara. Hann spældi fiól, eitt nú í Tórshavnar musikkskúla og Føroya symphomiorkestri. Eisini spældi hann orgul og var eitt skifti organistur í Kvívíkar kirkju. Sang í kóri og sjónleik spældi hann eisini, og var eitt skifti nevndarlimur í Havnar Sjónleikarfelag og Meginfelag Áhugaleikara. Ættargransking hevði hansara stóra áhuga.

Tekniskt snildur var hann eisini. Hann treivst so sera væl, tá hann smíðaði og skrúvaði, og tá Marita og hann fyri ikki so ógvuliga langari tíð síðani innrættaðu sær húsini av nýggjum, var lagið gott. Og síðst í 80'unum tá ið javnaldrandi og yngru starvsfelagar hansara nærum ikki enn vistu, hvussu ein telda skuldi tendrast ella enn minni brúkast, var Kári longu førur fyri at broyta uppsetingarnar í stýrisskipanini í telduni hjá sær. Gávurnar vóru nógvar og áhugamálini eisini.

Eitt politiskt menniskja var hann eisini. Politikkur kom at hava stóran leiklut í lívi hansara – ivaleyst ov stóran viðhvørt. Kári var konu síni Maritu ein dyggur stuðul, tá hon var virkin í politikki, eins og hann eisini var Javnaðarflokkinum ein dyggur stuðul.

Miðskeiðis í 90'unum gjørdi Kári av at rigga av advokatvirkið sítt, og tók tá við starvi sum løgfrøðiligur ráðgevi í Mentamálastýrinum, har hann starvaðist nú hann doyði.

Kári giftist Maritu f. Johansen úr Vági í 1962. Hon var útbúgvin lærari og sálarfrøðingur og var løgmaður í 1993/94. Hon doyði 26. august 2001. Saman fingu tey synirnar Atla, Una og Búa. Tey settu búgv uppi undir Varða í Havn. Marita og Kári suppleraðu hvønn annan væl, og var Kári ein góður konumaður. Altíð er ringt at missa hjúnafelaga, og hjá Kára tyktist, sum at hetta gjørdist honum ein óvanliga harður smeitur, og eftir at Marita doyði mestsum fánaði hann burtur.

Tankar okkara leita til synirnar sum við so stuttum millumbili hava mist bæði móður og faðir.

**Turið, Ida, Sjúrður og Poula**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður mín, sonur, pápi, verpápi og abbi okkara

**Jógvan T. Jacobsen**
Skála

andaðist hóskvøldið 01. august, 59 ára gamal, umborð á West Ekspress, fyrr nevndur Lupus, ávegis til Fraklands.

Jarðarferðin verður úr Skála kirkju leygardagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*

**Jonna**

Tey, ið vilja minnast Jógvan kunna lata eina peningagávu til Skála kirkju, konto í peningastovnunum.

†

Tað verður gjørt kunnugt fyri ætt og vinum, at okkara kæra kona, mamma, vermamma og omma

**Poula Sólrun Toftum, f. Vestureið**
fødd 10. august 1941 í Vági

doyði 8. august.

Kistan fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi leygardagin 10. august kl. 18.00.

Jarðarferðin verður sunnudagin 11. august kl. 13.30 úr Vágs kirkju.

*Vegna tey avvarðandi*

**Johan**

**Tøkk**

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá kæri maður mín, pápi, verpápi og abbi okkara

**Bent Rubek Rubeksen**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Giktafelag Føroya. Og ein tøkk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Jóna**






Anfinn Kallsberg sum bókhaldari á Frostvirkinum 1977-82:

# Flutti 912.000 krónur til egin feløg



*Sum bókhaldari á P/F Frostvirkinum í Norðdepli flutti Anfinn Kallsberg 912.000 krónur til feløgini Rivið og Samogn, har hann sjálvur var stjóri og partaeigari. Sambært semju 9. januar 1984, vórðu pengarnir goldnir aftur*

**Málið, ið skapti orrustuna millum Tórbjørn Jaocbsen og løgmann fyri ólavsøku, snýr seg um pengar, sum Anfinn Kallsberg sum bókhaldari hjá Frostvirkinum í Norðdepli flutti til partafeløgini»Rivið« og »Samogn«, har hann sjálvur var stjóri og partaeigari**

STRÍÐ UM LØGMANN
*Eirikur Lindenskov*

Anfinn Kallsberg flutti í árunm 1977-1982 912.000 krónur frá P/F Frostvirkinum til feløgini P/F Rivið og P/F Samogn – bæði feløg, har hann sjálvur var stjóri og partaeigari. Hetta vísa skjøl, sum Sosialurin hevur fingið innlit í.

Hóast Tórbjørn Jaocbsen, løgtings- og fólkatingsmaður Tjóðveldisfloksins á ólavsøku tók aftur skuldsetingarnar móti løgmanni, so hevur hann kortini gjørt greitt, at hann ikki hevur tikið aftur skuldsetingina um, at »løgmaður og Jørgen Niclasen ikki kenna mun á sínum og annara«.

Málið fekk nógva viðgerð í fjølmiðlunum fyri ólavsøku, og tað kom eisini fram, at Tórbjørn Jacobsen sipaði til júst hetta málið, sum snýr seg peningaflytingar millum Frostvirkið í Norðdepli, har Anfinn Kallsberg var bókhaldari og kassameistari, og feløgini Rivið og Samogn, har Anfinn Kallsberg sjálvur var stjóri og eigari.

Tað er ein kanning hjá Grannskoðarafelagnum Carl Vilhelm Weihe, sum staðfesti, at óregluligar peningaflytingar vóru farnar fram.

Kanningin er gjørd í samband við uppsetan av roknskapi hjá P/F Frostvirkinum í 1982. Grannskoðarafelagið hevur kannað millumrokning við P/F Samogn og P/F Rivið fyri árini 1977-1982. Teir hava eisini kannað tey í roknskapinum uppførdu virði av goymslu.

– Henda kanning er farin fram á tann hátt, at Niels Dann West, sum tá var rakstrarleiðari á Frostvirkinum, fyrst hevur gjøgnumgingið skjalatilfarið hjá P/F Frostvirkinum, síðani hava vit gjøgnumgingið skjalatilfar hjá P/F Samogn og P/F Rivið. Úrslitið av hesi kanning er, at feilir hava verið í roknskapinum í status pr. 31.12.81, siga Carl Vilhelm Weihe og Árni Absalonsen, grannskoðarar í einum uppriti um mál-ið, sum er dagfest 9. januar í 1984.

Pr. 31. desember í 1981 sær feilurin hjá Anfinni Kallsberg soleiðis út:

(sí talvu)

Sostatt er feilurin, at Anfinn Kallsberg hevur flutt feløgunum, har hann sjálvur var stjóri og partaeigari, 912.183 krónur og 36 oyru, sum hann ikki átti at gjørt.

Í einum innslag í Degi og Viku, sum varð sent 26. mars í 1993, og sum sjónvarpið endursendi herfyri, sigur Anfinn Kallsberg, at hann sum bókhaldari hevur gjørt fleiri hundraðtúsund bókingar, og tí heldur hann tað ikki vera so løgið, um onkur bóking er komin skeivt fyri. Men tað sum spurningurin kann setast við er, hví hann sum bókhaldari hjá Frostvirkinum í eitt fimm ára skeið bara hevur tikið feil, tá hann hevur flutt pening skeivt til tey feløg, har hann sjálvur var stjóri…

Grannskoðarafelagið hjá Carl Vilhelm Weihe sigur í uppritinum, at teir hava lagt úrslitið av kanningini fyri Anfinn Kallsberg, sum gjøgnumgekk skjalatilfarið viðvíkjandi hesum feilum.

– Hann segði seg ikki duga at síggja annað enn, at hetta eru ting, sum mugu rættast, stendur í uppritinum.

Ein fundur verður hildin um málið hin 9. januar í 1984. Á hesum fundi eru Niels Pauli Danielsen, nevndarformaður í Frostvirkinum, Absalon í Buð, Anfinn Kallsberg, Carl Vilhelm Weihe og Árni Absalonsen.

Á hesum fundi verður semja gjørd um, at uppskotið til roknskap 1982 varð broytt sambært omanfyristandi, og at saldoin við P/F Samogn og P/F Rivið verður útlíknað á tann hátt, at Frostvirkið keypir tann laks, sum bátarnir hava landað seinast í 1983.

Um hetta ger tað neyðugt hjá bátunum at útvega fígging til hýrur og aðrar útreiðslur, so vil P/F Frostvirkið á nevndarfundi í 1984 viðgera, um virkið kann leggja út fyri bátarnar, so hvørt sum teir fiska, ímóti at bátarnir binda seg til at avreiða til Frostvirkið, tá túrurin er av.

| | | |
|---|---|---|
| Goymsla sb. bókh. (fiskavørur) | 1.554.188,75 | |
| Skal vera .................... | 832.963,75 | 721.225,00 |
| Goymsla pakn. v.m. sb. bókh. . | 227.611,00 | |
| Skal vera .................... | 107.371,00 | 120.240,00 |
| P/F Rivið sb. bókh. .......... | 246.305,58 | |
| Skal vera .................... | 543.751,34 | -297.445,76 |
| P/F Samogn sb. bókh. ......... | 85.222,44 | |
| Skal vera .................... | 699.960,04 | -614.737,60 |
| | | - 70.718,36 |

*Feilflytingarnar sum Anfinn Kallsberg hevði gjørt vegna Frostvirkið til Rivið og Samong vóru tilsamans 912.183 krónur og 36 oyru í eitt fimm ára skeið frá 1977-1982*

Restorffs Gentur

Sølan av Restorffs framleiðslum er støðugt økjandi. Restorffs fer í næstum at bjóða fram eitt samlað tilboð uppá skonking í sambandi við veitslur, brúdleyp, samkomur osfr., Tað er okkara ætlan at henda service skal verða góð, professionel og karmurin um ta perfektu veitsluna.

Í hesum sambandi hava vit tørv á nøkrum gentum. Hesar skulu verða yvir 18 ár, fryntiligar og servicemindaðar og gjarna musikalskar

*Komið og hjálpið okkum við tí góða lagnum !*




Restorffs
*Tað góða Lívið !*

Hotel Føroyar ★★★★

**Størv**

petur & petur • 320870

*Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum, sum verður rikið sum sjálvstøðugt partafelag í Smyril Line samtakinum. Hotellið er tað største í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar – og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ítróttarfólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Hotellið hevði í 2001 2,5 mió. í rakstraravlopi. Í løtuni starvast 46 fólk á Hotel Føroyum.*

KOKKALÆRLINGUR

*Vit søkja eftir einum kokkalærlingi at byrja skjótast tilber.*

*Vit bjóða tær eina útbúgving, ið tekur 4 ár, har lærutíðin umfatar starvsvenjing á Hotel Føroyum og skúlagongd á tekniskum skúla í Danmark.*

*Tú kemur at starvast saman við einum ungum liði í einum umhvørvi har tað hendir nakað. Sum lærlingur í einum altjóða hotelli fært tú nógvar avbjóðingar.*

*Hevur tú áhuga fyri ferða - og tænastuvinnuni, umframt matgerð á hægri støði, hevur tú nú møguleikan fyri einum læruplássi.*

*Vit vænta,at tú ert ágrýtin, fyrikomandi og løtt/lættur av lyndi.*

*Verður tú kokkalærlingur á Hotel Føroyum, lova vit tær eina fjøltáttaða útbúgving og hollar royndir, sum tú kanst brúka víðari á tíni ferð gjøgnum lívið.*

*Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til høvuðskokkarnar Gunndur Fossdal ella Una Gullfoss á 31 75 00.*

*Umsóknir skulu sendast til:*
*Hotel Føroyar P/F*
*Postsmoga 3303*
*FO-110 Tórshavn*

TÆNARALÆRLINGUR

*Vit søkja eftir einum tænaralærlingi at byrja skjótast tilber.*

*Vit bjóða tær eina útbúgving, ið tekur 3 ár og 4 mánaðir, har lærutíðin umfatar starvsvenjing á Hotel Føroyum og skúlagongd á tekniskum skúla í Danmark.*

*Tú kemur at starvast saman við einum ungum liði í einum umhvørvi har tað hendir nakað. Sum lærlingur í einum altjóða hotelli fært tú nógvar avbjóðingar.*

*Hevur tú áhuga fyri ferða - og tænastuvinnuni, hevur tú nú møguleikan fyri einum læruplássi.*

*Vit vænta,at tú ert smílandi, ágrýtin, fyrikomandi og løtt/lættur av lyndi.*

*Verður tú tænaralærlingur á Hotel Føroyum, lova vit tær eina fjøltáttaða útbúgving og hollar royndir, sum tú kanst brúka víðari á tíni ferð gjøgnum lívið.*

*Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Johannes Jensen, stjóra á 31 75 00.*

*Umsóknir skulu sendast til:*

*Hotel Føroyar P/F*
*Postsmoga 3303*
*FO-110 Tórshavn*

Hotel Føroyar ★★★★